# Bygdaráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 28.05.2026 kl. 16.30

| | |
|---|---|
| Á fundi: | Janus Thomsen |
| | Poul Laust Christiansen |
| | Rakul Mørk |
| | Jóhannes Liasson Rasmussen |
| | Otto West |
| | Thorstein Thomsen (fyri Jónfinn L. Poulsen) |
| Ikki møtt: | Ronni Hammer |
| Skrivari: | Johanna B. Djurhuus |

1. **102-31-2026: Kostnaðarmeting – umvæling av hitaskipan.**

Umboð fyri kommununa, Tangavirkið og SF Teknik hava gjørt eitt tilmæli til møguliga loysn á trupulleikanum við hitaskipanini á dagstovninum. Kostnaðarmetingin er umleið kr. 109.000,00 uttan MVG.

**Trivnaðarnevndin 26.05.2026:**

Nevndin hevur ikki viðgjørt málið.

**Fíggjarnevndin 28.05.2026:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at fáa hetta gjørt sambært kostnaðarmeting/tíðarætlan v.m.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

2. **102-29-2026: Góðkenning av roknskapi fyri 2025.**

Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2025 til góðkenningar. Inntøkurnar frá kommunuskatti og øðrum inntøkum eru tkr. 43.620, rakstrarútreiðslur tkr. 36.979, rentustuðul og rentuútreiðslur tkr. 1.090 og løguútreiðslur tkr. 4.256. Roknskapurin gevur eitt avlop á tkr. 1.295.

| | **Rakstur:** | | **Løgur:** | |
|---|---|---|---|---|
| §1. Kommunal fyrisiting | tkr. | 2.795 | tkr. | 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | tkr. | 14.804 | tkr. | 359 |
| §3. Børn og ung | tkr. | 7.574 | tkr. | 0 |
| §4. Undirvísing | tkr. | 3.325 | tkr. | 0 |
| §5. Mentan og frítíð | tkr. | 1.657 | tkr. | 0 |
| §6. Teknisk mál | tkr. | 3.710 | tkr. | 1.997 |
| §7. Kommunal virki | tkr. | 3.114 | tkr. | 1.900 |
| **Íalt** | **tkr.** | **36.979** | **tkr.** | **4.256** |

Skattainntøkur vegna eldraøkið eru tkr. 11.084. Rakstrarútreiðslurnar til eldrasamstarvið eru tkr. 11.891 – leiguinntøka av sambýlinum er tkr. 362, nettokostnaður til eldrasamstarv er sostatt tkr. 11.529.

**Fíggjarnevndin 28.05.2026:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna ársroknskapin fyri 2025.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt.

3. **102-32-2025: Dagstovnurin Brosið – starvslýsing v.m.**

Starvslýsing, har søkt verður eftir námsfrøðingum til størv, ið hjálparfólk eru sett í og farloyvis-starv+barsilsfarloyvisstarv fyri námsfrøðingar.

**Fíggjarnevndin 28.05.2026:**

Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við starvslýsingini.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **102-33-2026: Val av garðaskoðara og umboði í vatnsýnisnevndina Hvalba.**

Skriv frá Jóhan D. Nónstein, har hann sigur seg frá sum garðaskoðara og sum umboð í vatnsýnis-nevndini í Hvalba. Janus Thomsen hevði uppskot um at velja Jaspur Tausen sum garðaskoðara og sum umboð í vatnsýnisnevndina fyri Jóhan D. Nónstein.

**Avgerð:**

Samtykt varð einmælt at taka undir við hesum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 17.30

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Rakul Mørk Otto West

Jóhannes Liasson Rasmussen Thorstein Thomsen